## DAGSINS MEINING

# Seks dagar til avgerandi valið!

Í skrivandi stund er ein vika til tað mest avgerandi løgtingsvalið í okkara tíð. Higartil hevur valstríðið mest snúð seg um teir báðar høvuðspurningarnar, sum vit kenna frá undanfarnum valum. Annar er spurningurin um framtíðarstøðu Føroya og hin er spurningurin um vælferðarsamfelagið, hvussu samhaldsfast tað skal vera ella ikki.

Tá tað snýr seg um vælferðarmálini er ikki so stórur munur á flokkunum. Tann borgarligi Sambandsflokkurin amast heilt upp at Javnaðarflokkinum. Fólkaflokkurin roynir at vera við, so hann ikki heilt dettur burtur ímillum, meðan Tjóðveldisflokkurin er eitt sindur meiri abstraktur.

Onkur nevndi herfyri, at tá vit fáa fullveldi, fáa vit »veruliga« vælferð. Og nú rópa øll tjóðveldisfólk um »veruliga« vælferð. Tá Javnaðarflokkurin setti tal á nøkur vallyfti, segði Tjóðveldisflokkurin, at slíkt er valagn. Ansingarpláss, pláss á ellisheimum, lestrarbústaðir skuldu vera rættur. Men flokkurin vil ikki siga hvat málið er.

Afturímóti er Javnaðarflokkurin ítøkiligur. Tað er ein erlig søk, og so hava vit eitt mál at halda okkum til. Munur er á flokkunum, men allir vilja fremja ein eldrapolitikk, sum Javnaðarflokkurin hevur skorið í papp, so tað kunnu vit fegnast um.

Verri er við ríkisrættarliga spurninginum. Her er ikki bara munur á flokkum, men eisini innanhýsis í flokkunum, serliga Fólkaflokkinum. Eisini kunnu vit tosa um sambands- og sjálvstýrissinnaðar javnaðarmenn, men tað tykist, at hann er farin til val sum ein flokkur um uppskotið til eina sjálvstýrislóg.

Valevni í Fólkaflokkinum føra seg so ymiskt fram, at fólk seta stórt spurnartekin við trúvirðið. Tí samstundis sum summi agitera sum reindyrkað loysingarfólk, agitera onnur á ein hátt, sum mest kann samanberast við politisku hugsanina hjá Javnaðarflokkinum. Men hetta er Fólkaflokkinum líkt – meira ein savning av einstaklingum enn ein floks-eind.

Tað er annars her í miðjuni, at ein semja um framtíðarstøðu Føroya skal finnast. Sjálvstýrisflokkurin hevur flutt seg inn ímóti miðjuni, og tað sama kann helst sigast um Miðflokkin, so tað verða helst hesir sum verða tungan á vágskálini, tá ein nýggj samgonga skal skipast.

Sambandsflokkurin er lítið ítøkiligur í síni nýskipanarætlan, at haðani er lítið í væntu. Hinvegin er Tjóðveldisflokkurin so viðgongdur í valstríðnum á hitt borðið, at munurin millum hann og Javnaðarflokkin tykist í løtuni alt ov stórur til, at nakað ítøkiligt kann spyrjast burtur. Og tað er spell, nú teir, sum tveir flokkar vinstru megin miðuna, hava nærum helvtina av atkvøðunum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Mogens Lykketoft, Maurentius Poulsen úr Ljósá og jødarnir

**Svenning av Lofti**
*formaður í Ísraelsfelagnum*



Sannast má, at mangt umbroytist á mansins ævi. Tá ið eg sum ferðaleiðari havi ferðast í Ísrael við føroyingum, so eru altíð nøkur støð, sum verða vitjað hvørja ferð. Eitt av hesum støðum er Yad Vashem, minnishøllin í Jerusalem um teir 6 milliónir jødarnar, sum lótu lív í Europa undir seinna heimsbarda - av nazistaávum.

Tá ið føroysku ferðabólkarnir eru farnir út úr bussinum og til gongu eftir gøtuni, ið gongur niðan til minnishøllina, verður altíð steðgað uttanfyri. Orsøkin er, at uttanfyri høllina stendur ein lítil árabátur ella jolla.

Meðan hugt verður eftir hesum lítla bátinum, greiður jødiski ferðaleiðarin frá, at í hesum og øðrum smábátum bjargaðu danir jagstraðum jødum úr Danmark og yvirum til Svøríki – til frælsi – undan nazistunum, sum høvdu í hyggju at taka allar danskar jødar og føra teir til fanga- og týningarlegurnar í Týskalandi.

Tá ið jødiski ferðaleiðarin er liðugur við sína frágreiðing, hevur tað altíð verið mær ein serstøk gleði at greitt føroyingunum og jødiskum ferðaleiðarum frá, at føroyingar eisini vóru millum teirra, ið førdu danskar jødar yvirum til Svøríkis.

Tá havi eg greitt frá um Maurentius Poulsen, úr Ljósá, sum við fiskifari sínum førdi so mangar jødar úr Danmark til Svøríkis. Hesi gudsóttandi og djarvi føroyski fiskimaðurin mundi hava fingið góðan kristnan førning heima í lítla bygdarumhvøvinum í sundalagnum, ein førning, ið førdi hann út í lívhættisligan bjargingarflutning av donskum jødum yvir til Svøríkis undir krígnum.

Maurentius í Ljósá var handtikin av nazistunum í 1945 og varð fyribils settur í Frøslev-fangaleguna í suður-jútlandi, haðani ætlanin var at senda hann í týska fangalegu. Men áðrenn týskararnir fingu flutt hann, endaði kríggið og hann gjørdist frælsur aftur. Maurentius kendi orðini í skriftini, ið Gud Harrin segði við Ábraham:

»Eg skal signa tey, ið signa teg. Og tann, ið tær bannar, honum skal eg banna«

(Mós. 12,3)

Øðrvísi var við Mogens Lykketoft hetta kvøldið herfyri í Keypmannahavn, tá ið hann setti harðliga inn á Ísrael í stuðli sínum til danskar palestinar. Palestinar gjørdu seg annars inn á og skaddu danir likamliga, ið vildu vísa Ísrael sín samhug.

Munur er á monnum!

# Ruskinnsavning í Tórshavnar kommunu

**TÍÐINDASKRIV**
*Tórshavnar Býráð*

Seinastu vikurnar hava fleiri fjølmiðlar vent sær til Tórshavnar kommunu við fyrispurningum um ruskinnsavningina í kommununi. Vit vilja tí gera tykkum kunnug við treytirnar, sum húsarhaldini í Tórshavnar kommunu skulu lúka, fyri at fáa ruskið beint burtur. Tær eru hesar:

Tórshavnar kommuna ger við hesum øll húski í kommununi kunnug um reglugerð um ruskinnsavning, sum er sett í gildi av Arbeiðseftirlitinum í 1994 og seinast broytt í 2000.

Posin til húsarhaldsburturkast skal standa stytstu leið millum hús og ruskbil, t.v.s. við ta síðu á húsinum, sum ruskbilurin kemur til.

**Posin til húsarhaldsburturkast kann viga**

– Er frástøðan millum ruskbil og posa í mesta lagi 3 metur, kann posin í mesta lagi viga 40 kg.
– Er frástøðan millum ruskbil og posa í mesta lagi 30 metur, kann posin í mesta lagi viga 25 kg
– Er frástøðan millum ruskbil og posa størri enn 30 metur, kann posin í mesta lagi viga 20 kg
– Eitt trappustig er at rokna sum ein metur.

**Økið millum ruskílat og ruskbil**

– Økið skal vera slætt og fast, uttan at vera hált. t.d. eru flísar, asfalt og grús vælegnað
– Hurðar, portur, e.l. skulu kunna standa opin og vera so breið og høg, at flutningur kann fara fram uttan ampa.
– Økið skal vera ljóst reint og ruddiligt.
– Økið skal vera ruddað fyri kava og hálku.
– Ruskílatið má ikki vera brotið
– Burturkastið má ikki koyrast leyst í posan, men skal vera innballað ella í einum plastposa. Hartil skal burturkast sum blæur, bind o.l. altíð vera í afturlatnum plastposa, áðrenn tað verður koyrt í ruskposan.
– Ruskposin má ikki ovfyllast. Posin er at rokna sum fullur, tá ið 20 cm eru eftir upp til kantin.
– Ruskposin skal ikki vera skræddur

**Í posan til húsarhaldsburturkast kann koyrast**

– Bert húsarhaldsburturkast má koyrast í posan

**Í posan til húsarhaldsburturkast kann ikki koyrast**

– vandamikið burturkast
– urtagarðsburturkast
– burturkast í sambandi við bygging ella umbygging
– knívar og onnur hvøss ting. Hesi skulu latast ruskinnsavnarunum fyri seg.

Fyri at posin skal verða heintaður, skulu hesar treytir fylgjast. Verður posin ikki heintaður, fær húskið seðil við fráboðan um orsøkina. Í ivamálum ella um serlig viðurskifti gera seg galdandi, kann borgarin venda sær til Tórshavnar Kommunu.


**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Er kreppan, ið var, orsøkin til støðuna í heilsuverkinum í dag?

**H. Petur Nielsen**
*yvirlækni*

Tað er at fegnast um, at valevni og flokkar nú kappast um at vísa heilsuverkinum vælvild og helst eisini umsíðir hava góðtikið, at heilsuverkið er natúrligur og týðandi partur av nútímans samfelagnum.

Spurningurin er tó, um fleiri pengar er einasti og nøktandi mátin til at dagføra og framtíðartryggja føroyska heilsuverkið.

Hvør var støðan í áttatiárunum og áðrenn kreppuna fyrst í nítiárunum?

Eftir danskari alin helst á leið – men sammett við hini norðanlondini var Landssjúkrahúsið (LS) sum eind afturúrsiglt, hóast summar funktiónir virkaðu á høgum støði. Í 1992 var tørvurin á teknologiskari basisútgerð á LS gjørdur upp til 17 mio. kr. Og ikki fyrrenn í 1991 var eitt álit liðugt um útbygging av LS, sum kreppan tó steðgaði. Týðandi serlæknaøki vóru als ikki normerað, ikki til staðar, og serliga sjónsk var undirmanningin innan narkosu, obstetriska og pædiatriska økið. (Fylgjurnar kann ein síggja í yvirlitum yvir perinatalan mortalitet (pinkubarnadeyða) hesi árini).

Búskaparliga trongu árini í Danmark seinnu helvt av 70'unum gjøgnum øll 80'ini og inn í nítiárini mergsugu danska heilsuverkið, so støðið bæði kvalitativt og kvantitativt lækkaði á so at siga øllum økjum. Tá tað kom til stóru sjúklingabólkarnar við krabbameins- og hjartasjúkum, máttu danir venja seg til, at hvørki útgerð ella førleiki, sum grannatjóðirnar bjóðaðu sínum sjúklingum, var í landinum. Teir máttu góðtaka, at land teirra ikki megnaði meir enn lutvíst 1/3 av bypass-skurðviðgerðum hini norðanlondini bjóðaðu, og at krabbameinssjúklingar ikki sluppu framat stráluviðgerð, sum í grannalondunum. Eisini gjørdu serlæknafeløgini vart við, at útbúgvingarstøðið var farið undir alt mark. Drúgva stagnatiónin viðførdi, kanska eina mest uttan fyri universitetssjúkrahúsini, eina diagnostiska og viðgerðarliga nihilismu – tí tú fekk ikki hjálpt sjúklingunum í hvussu var.

Heldur ikki hava vit himprast við at bjóða føroyingum tann ivasama solidaritet at standa í kø saman við dønum til krabbameinsviðgerð og hjartakirurgi, uttan mun til um okkara egnu fíggjarligu evnir vóru til aðra loysn ella ikki.

Fyri danir var henda støða kanska ikki heilt órímilig. Eitthvørt land má seta sínar heilsupolitisku ambitiónir eftir síni fíggjarliga orku.

Hugburðurin her á LS og gjøgnum árini eisini umsitingarliga og politiskt hevur ligið og liggur so nær uppat danskari siðvenju, at vit so at siga av fríum vilja hava "forvaltað" arbeiðslag og mál hjá kreppu-kenda danska heilsuverkinum her á LS, eisini áðrenn okkara egna kreppa byrjaði.

Um tørvurin á fermetrum, teknologi og serlæknaøkjum gjøgnum 80'ini – tá so mangar íløgur vóru gjørdar – varð settur eftir einum norðurlendskum mátistokki heldur enn einum donskum, er óvist um støðan hevði verið so ring í dag. Hinvegin eiga vit, hóast stórar íløgur standa fyri framman og nógvir trupulleikar enn eru at vinna á, at minnast til, at Landssjúkrahúsið gjøgnum 90'ini, hóast ein kreppukendan búskap, hevur fingið ikki sørt av nýggjari teknologi og eisini fingið týðandi serlæknaøki normeraði og mannaði og soleiðis fingið tilskot av týdningarmiklari vitan. Vit kunnu tí eisini fegnast um, at ein av teimum avgerandi vælferðarparametrunum, nevniliga pinkubarnadeyðin, er fallin og nú liggur millum teir lægstu í norðanlondum. Vit síggja eisini úrslit í einum av teimum størstu sjúklingabólkunum, har árligi deyðin av hjartasjúku er spakuliga fallandi seinnu árini.

Danir hava seinnu árini, nú teirra fíggjarstøða er batnað, økt munandi um bæði íløgur og fíggjarkarm til heilsuverkið. Kvalitetur og kapasitetur er skjótt aftur á norðurlendskum støði. Hiðani havi eg innan hjartaøkið týðuliga merkt hesa framgongd, sum eisini er komin føroyskum sjúklingum til góðar.

### Hvør er læran?

Einki er at ivast í, at kreppan fyrst í nítiárunum var eitt bakkast fyri føroyska heilsuverkið. Hinvegin hevur kreppan ikki verið so drúgv, at hon skuldi sett okkum í eina so torføra støðu, sum vit hava verið í seinastu árini. Nógv bendir á, at okkara egna og púra frívilliga tillaging til drúgvu donsku kreppuna gav okkum eitt órímiliga lágt útgangsstøði við atliti at manning, teknologi og arealtørvi, áðrenn okkara egna kreppa byrjaði. Ikki er tí at undrast á, at tungt er at koma uppundan aftur. Vit skulu ikki bert taka heilsuverkið burturúr okkara egnu kreppu, men eisini úr tí donsku, sum vit sjálvi hava tikið inn á okkum. Munurin gerst alt sjónskari nú danska heilsuverkið mennist í stórum saman við positivu gongdini í danska búskapinum.

Sjálvsagt er lítil troyst í at størri partur av truplu støðini á m.a. LS er at finna áðrenn kreppuna.Hetta eigur tó at minna okkum á hvussu skeivt tað kann ganga tá vit lena okkum uppat útlendskum "loysnum", og sjálvi hava valt at hava bind fyri eyguni.

Um vit innan heilsuverkið, – og tað geldur helst onnur øki við - ikki syrgja fyri, at vit í størri mun lata okkum ávirka av øðrum londum, kanska serliga norðanlondum, verður tað helst ikki seinastu ferð, at vit gera tað álvarsama mistak, at vit kopiera danskar skipanir, sum kunnu vera óegnaðar, og tíðin vera gingin frá. Uttan útbúgvingar og uttan arbeiðsroyndir úr øðrum londum enn í Danmark fær almenni sektorurin tað torført, tá tað kemur til at gera sjálvstøðugar metingar og síðan gera syntesir, sum taka støði í føroyskum viðurskiftum.Fyri teimum flestu tykist hetta sjálvsagt og natúrligt, men farið ikki skeiv, tí sterkar kreftir meta tað sum tað reina myttarí at taka sonevndar ódanskar loysnir uppá tunguna. Okkara ótrúliga sterka mentala binding til donsk viðurskifti og nærmast paniski ótti fyri aðrari ávirkan kann sum frálíður gerast størsta forðingin fyri – ella amboðið ímóti – sjálvbjargni.

# Rikisfelagsskapurin største aktiv føroyinga - men hvør ræður hvørjum?

**REGIN EIKHÓLM**



Tíðin krevur størri eindir bæði í verjupolitiskum og fíggjarligum høpi. Vit hava verjusamgongur sum NATO og búskaparsamgongur sum EU, har fordums nationalromantikkur má víkja fyri dagførdum krøvum fyri at kunna klára seg í altjóða høpi. Nalvaskoðandi nationalistiska hugrákið er ein ræðandi hugsunarháttur, sum annar heimsbardagið átti at havt sett ein stoppara fyri einaferð med alla!

Okkara ríkisfelagsskapur má hava verið langt frammanfyri sína tíð, tí bæði vit 47.000 her heima og teir 20.000 føroyingar í Danmark hava eina vælferð, sum mong misunna okkum. Ikki so løgið kanska at íslendingar hvørt ár í hundraðatali flyta til Danmarkar, tí tilveran í Íslandi er vorðin teimun ov trælakend. Det koster at spille stor Kar, segði norðmaðurin!

### Útbúgving

Eini 1500 til 2000 føroyingar eru niðri í lestrarørindum, og tað er yvir 90% av øllum teimum, sum nema sær útbúgving uttanlands. Í ríkisfelagsskapinum kunnu føroyingar nevniliga frítt nema sær útbúgving runt allan knøttin takkað veri altjóða ríkisfasilitetunum. Við eini loysing missa vit øll hesi í ríkisfelagsskapinum sjálvgivnu rættindi. Sjálvt tað at lesa í Danmark verður eins og hjá íslendingum uppá nass, tí tá skulu donsku vaskikonurnar eisini til at gjalda fyri fremmand føroysk lesandi.

Annars er ein ungur føroyingur júst upptikin á kenda Harvard Universitetinum – sum einasti í danska kongaríkinum í ár. Hann sigur í vitalu við sosialin (13/4-2002), at hann er upptikin sum føroyingur og ikki sum dani. Men um hann ikki hevði verið staddur í Danmark, ta tíðina fyrireikingin og umsóknarprosessin stóð uppá, so hevði hetta als ikki borið til, sigur hann.

### EU-passið

At 1/3 av øllum føroyingum búgva í Danmark umframt teir mongu undir útbúgving har, sigur nakað um trivnaðin í ríkisfelagsskapinum, og at okkara ríkisborgararættur er eitt aktiv, sum hevur alstóran týdning fyri føroyingar og Føroyar. Sum brúgvahøvd til EU er ríkisfelagsskapurin ein funnin fressur, umframt at EU eisini er okkara største marknaður. Innan fyri passøkið stendur føroyingum frítt at velja føroyskt - ella EU-pass, og við teimum mongu rættindum, sum fylgja við EU passinum, kann tað valla undra nakran, at yvir 60% av føroyingum her á landi longu nú velja EU passið. Tað, at Føroyar kunnu standa uttanfyri EU og kortini í ávísum førum njóta javngóð rættindi í EU, sigur nakað um hvussu smidligur ríkisfelagsskapurin er.

### Hvør ræður hvørjum

Ein føroyskur fólkatingslimur hevur einans 23.500 borgarar aftan fyri seg, meðan ein danskur hevur 30.000. Ein føroyskur fólkatingslimur hevur sostatt uppá seg 20% meiri at siga í danska Fólkatinginum enn ein danskur fólkatingslimur. Føroyingar eru soleiðis meiri ráðandi í Fólkatinginum enn danir í mun til fólkatali, umframt at danir stilla føroyingum frítt til at loysa, um meirluti er fyri tí í Føroyum - ongin tvingsil.

Størri eindir hava ofta fíggjarligar fyrimunir, og ríkisfelagsskapurin er einki undantak í so máta. Kendi Århus professarin, Martin Paldam, sigur í viðtalu við B.T. (21/2-1995), at livifóturin í Føroyum vildi lækkað við 25%, um vit fara úr ríkisfelagsskapinum t.v.s., at Føroyar við loysingini høvdu fingið sama livifót sum Skotland og Portugal.

### Loysingarfrælsið

Loysingarhópurin sigur hinvegin, at framtíðin gerst tryggari, og at Føroyar verða betri at liva í aftaná eina loysing. Men okkara lítilleiki og einstreingjaða vinnulív gevur ikki stóra trygd í sjálvum sær og beinrakni og hegnisliga gjørdi dokumentarfilmurin úr Hattarvík, "Burturhugur", hjá Tóta Árnasyni, gevur okkum eina ræðandi mynd av, hvussu eitt lítið samfelag kann verða slept uppá fjall, tá tað fíggjarliga ikki longur er gevandi. Nútímans føroyingurin krevur meira í vælferð enn vetrarkvirruna í Hattarvík!

Ein dagførdur ríkisfelagsskapur vil framhaldandi kunna tryggja, at lívsfrælsi og samhaldsfesti verður verandi í føroyska gerandisdegnum, og er tí eisini fyri nútíðarmenniskja meiri nøktandi, enn eitt loysinagrfrælsi við 25% lægri livifóti, lítlari trygd og skerdum rættindum annars.

# Einastandandi upplestur og skaldsøga

**Ólavur í Beiti**
*rithøvundur*



Tað hevur verið hugaligt og stimbrandi at hoyrt upplesturin hjá Páll Danielsen av skaldsøguni hjá Oddvør Johansen – »Tá ið eg havi málað summarhúsið«. Og tað er ikki minni hugaligt og stimbrandi at aðrir høvundar nú eisini eru farnir at lýsa samtíðina, sum Oddvør hevur gjørt í hesi nýggju skaldsøguni so frálíka væl.

Sjálvur havi eg roynt at skriva frá mínum sjónarhorni og gav í 1989 stuttsøgusavnið »Einaferð« út, og nerti við nakrar tættir frá tíðini tá, sum Oddvør eisini hevur hegnisliga lýst í síni nýggju skaldsøgu. Tað var ein roynd hjá mær í 1989 at geva lesaranum nakað annað og øðrvísi tá, og nú síggi eg eftir at hava hoyrt skaldsøguna hjá Oddvør Johansen, at henda royndin var ikki til fánýtis.

Og nú er so bara at vóna at uppaftur yngri høvundar fara at skriva, tí hevur tað verið nógv at skriva um – tað er neyvan minni nú! Hugsi um alla hesa nýggju tøknina, ið komin er fram seinnu árini, við øllum møguleikunum á bæði einum og øðrum øki, sum skaldskapurin ikki enn hevur gjørt nakað við!